Føroya Tele økir um breiðbandið

Allir privatkundar hjá Føroya Tele, fáa nú tvífalt so høga ferð á breiðbandinum fyri sama prís. Fyri breiðbandshald við háferð fýra-faldar Føroya Tele ferðina í ávísum førum, soleiðis at Føroya Tele bjóðar 8mbit flatrate fyri 2 mbit prís. Á fleiri privatum haldum við kvotu, tekur Føroya Tele kvotuna burtur og bjóðar veruligt flatrate fyri sama prís. Hartil varðveitir Føroya Tele nakrar lágferðir, við møguleika fyri at velja nýtslukvotu ella flatratehald. Føroya Tele broytir haldið sjálvvirkandi, soleiðis at allir privatkundar hava fingið hægru ferðirnar innan 15. juni, sigur Føroya Tele í tíðindaskrivi

upulleikum

- Broytast fyritreytirnar ikki við stagnatión ella lækking í oljuprísunum, og raksturin í vinnuni á landi gerst meira lønandi, hevur virksemið ongan møguleika, sigur Jóhan Páll Joensen, stjóri í Maru Seafood

inum bæði á landi og sjógvi hevur verið vánaligur.

- Jú, eg stúri fyri gongdini, sigur hann, tá vit spyrja, um hugsandi er, at virksemið hjá felagnum kann fara av knóranum.

Jóhan Páll sigur, at í tíðum sum hesum, tá so nógv viðurskifti ganga ímóti, er man altíð útsettur fyri, at tað ringasta kann henda.

- Men vit royna, og eg vóni ikki, at tað verður so galið kortini.

Alt kann henda

Vit spurdu eisini stjóran í Maru Seafood, um hugsandi er, at nakað kann henda á aðalfundinum, sum ger, at alt virksemið hjá samtakinum steðgar í einum.

- Tá raksturin er so vánaligur, og útlitini eru so døpur, er vandin altíð til steðar.

Bæði fiskavirkisvinnan hjá Maru Seafood og Faroe Seafood, sum eru størstu samtøkini av sínum slagi í Føroyum og skipavinnan hjá somu feløgum hava tað sera trupult í løtuni.

- Broytast fyritreytirnar ikki við stagnatión ella lækking í oljuprísunum, og raksturin í vinnuni á landi gerst meira lønandi, hevur virksemið ongan møguleika, sigur stjórin.

Tað vísir seg, leggur hann aftrat, at tá tað gongur væl, gongur alt væl – og tá tað gongur illa, gongur bara alt illa.

Treingir samanum

Stjórin í Maru Seafood ásannar, at trupult er at fáa pening til rakstur av virkseminum.

- Alt treingir saman um, og tað er sera trupult at reka vinnu, soleiðis sum umstøðurnar eru í løtuni. Toskaveiðan undir Føroyum er í løtuni á tí minimala, og hetta sæst eisini aftur í allari fiskivinnuni.

- Toskurin hevur 4-5 ferðir so góðan prís, sum eitt nú upsi, og tí er greitt, at tað merkist um alla vinnuna, tá toskurin svíkur.

Jóhan Páll Joensen sigur, at vónin hjá skipavinnuni er, at oljuprísurin stagnerar – og helst lækkar – samstundis, sum meira verður at fáa av toski.

- Neyðugt er eisini, at raksturin av fiskavirkjunum gerst meira lønandi aftur, sigur stjórin í einum av størstu fiiskivinnusamtøkum í Føroyum við umleið 300 fólkum undir sínum hatti.

Bygnaðarbroytingar í fiskiflotanum, sum fremja burðardygga veiði, er leiðin burtur úr kreppuni

Loysnir saman við fiskivinnuni

Prísurin á olju til fiskiskipaflotan í evropeiskum havnum er øktur umleið 240% síðan 2004, men fiskivinnukommiserurin í ES heldur ikki, at oljustuðul er nøkur gongd leið

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Fiskivinnukommiserurin í ES, Joe Borg, heldur, at aktuellu trupulleikarnir, sum fiskiflotin í ES er komin í, botna í bygnaðarligum ósambæri millum stødd av fiskiflota og burðardygga veiðu.

- Hesir trupulleikar eru bara vorðnir nógv størri av stóra vøkstrinum í oljuútreiðslunum seinastu árini.

Joe Borg vísir á, at prísirnir á olju til fiskiflotan eru øktir eini 240% síðan ár 2004.

Hann sigur, at skjót hjálp kann veitast til at bjarga og umleggja fiskiflotan, um hetta samstundis ger veiðina meira burðardygga.

- Vit fylgja væl við gongdini og royna at finna vegir til loysnir saman við vinnuni. Neyðugt er at gera fiskiflotan føran fyri at vinna á álvarsligu trupulleikunum og fremja neyðugu bygnaðarligu broytingarnar.

Joe Borg ásannar, at skeivar avgerðir eru ikki vegurin fram í eini slíkari støðu og vísir á, at eitt nú størri kvotur, sum onkur hevur mælt til, bara høvdu gjørt støðuna uppaftur truplari sum frá líður.

Hann heldur eisini, at møguligur oljustuðul hevði gjørt, at trupulleikarnir í fiskiskipavinnuni fara at halda fram, og at kollapsið hevði verið uppaftur størri, tá tað kemur.

Niðurstøðan hjá ES-fiskivinnukommiserinum er greið:

- Neyðugt er at gera okkurt nú fyri at umleggja fiskiskipaflotan, sigur Joe Borg.

Tað er heimasíðan hjá Danmarks Fiskeritidende, sum ber hesi tíðindi.

Joe Borg, fiskivinnukommiserur í ES, heldur, at møguligur oljustuðul hevði gjørt kollapsið í fiskivinnuni uppaftur størri, tá tað kemur

Sviar ala tosk

TOSKAALING
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Fyri fyrstu ferð fara sviar nú at ala tosk.

Ætlanin er at fara undir toskaaling har suðuri við Skåne-strondina í Svøríki.

Sambært svenskum sjónvarpi er toskur eitt av truplastu fiskasløgunum at ala, tí fiskurin helst skal hava æti at eta, til hann er vorðin 5 sentimetrar langur.

Í svenskum sjónvarpi verður annars vísti til góðu royndirnar, sum norðmenn hava av at ala tosk.